# SIGFRÍÐU

**VODAFONEDEILDIN** Sigfríður Clementsen, venjari hjá B36, hevur fleiri ferðir fingið skotið í skógvarnar, at hann ikki raðfestir undirhaldsvirðið í fótbóltsspælinum í fremstu røð. Men hann er helst føroyski venjarin, sum hevur vunnið flest stig í bestu deildini síðstu fimm árini. Í gjár komu aftur trý stig í hús



Uni Holm Johannesen

| | |
|---|---|
| B71 | 0 |
| B36 | 3 |

Sigfríður Clementsen taldist miðskeiðis í 90-unum millum bjartastu og vandamestu framherjarnar í føroyskum fótbólti. Hann hevði eitt temposkifti sum fáur og framúrskarandi gávur sum skarprættari. Nærlagdur og hugflogsríkur var hann oftast væl lýddur millum viðhaldsfjøldirnar kring landið. Hann talaði sítt greiða mál við bóltinum millum føturnar. Tí er tað ein syrgisøga, at hann tíðliga noyddist at takka fyri seg sum fótbóltspælara. Hann var illa darvaður av skaðum og spældi seinast fyri fullari megi í 1997.

Hann vildi tó ikki sleppa spælinum uttan víðari. Sigfríður Clementsen hevur tveitt seg yvir venjarayrkið. Men fleiri vilja vera við, at sum fótbóltsvenjari stendur hann í andsøgn við fótbóltsspælaran.

Tað eru ikki øll, sum hava nógv til yvirs fyri honum sum venjara. Serliga í Sundalagnum mettu fleiri, at hann tók spæligleðina frá spælarunum. Tað er sagt, at hann hevur keðiligan og alt ov verjukendan hugburð til fótbóltin, og hann vísir sera sjáldan dirvi. Onkur er farin so langt sum at siga, at hann rætt og slætt tekur undirhaldið úr fótbóltsspælinum.

Tað eru slíkar lýsingar, sum Sigfríður Clementsen hevur lagt oyra til seinastu sjey árini, sum hann hevur virkað sum venjari. Men hann vinnur fótbóltsdystir. Aftur og aftur. Seinast var í gjár, tá B36 vann greitt og uppiborið á útivølli móti B71. Úrslitið var 3-0.

## Galdandi allastaðni

Útgangsstøðið hjá Sigfríða Clementsen í gjár kom heldur ikki óvart á. B36 var verjukent. Men sambært venjaranum er tað ein leistur, sum ger seg galdandi allastaðni.

– Føroysk og útlendsk feløg eru farin at leggja seg eftir at skipa seg betur defensivt og tað ávirkar avgjørt undirhaldsvirðið í fótbóltinum. Hinvegin haldi eg frá einum taktiskum sjónarmiði, at fótbólturin er vorðin meira áhugaverdur, enn hann hevur verið, segði Sigfríður Clementsen í viðtalu við Sosialin í 2006.

Málini, sum B36 fekk á Sandi, vóru ikki beinleiðis hugflogsrík. Fróði Clementsen stútaði gestirnar framum eftir frísparksframlegging stutt áðrenn hvíldina. Róaldur Jacobsen økti í seinna hálvleiki eftir skjótálop, og Christian R. Mouritsen staðfesti sigurin, tá lítil løta restaði í. Hann var fyrstur á bóltinum, tá Bárður Johannesen hevði hálvbjargað.



Jákup á Borg sigur, at Sigfríður Clementsen hevur sett greiðar linjur fyri, hvat hann metir er sømiligt og ikki.

– Hann hevur sína hugsanir, og spælararnir hava gleðiliga tikið undir. Hvør einstakur kennir sítt pláss, og vit stríðast fyri hvørjum øðrum, sigur Jákup á Borg.

Johan Ellingsgaard var aftur høgri bakkur hjá B36 í gjár. Hann hevur í hesum kappingarárinum verið raskur at tikið lut í framrættaða spælinum. Hann hevur ikki kensluna av, at hann ikki hevur fríar teymar á vøllinum.

– Vit hava sjálvsagt einstakar bundnar uppgávur á vøllinum. Tað slepst ikki undan. Men tað er als ikki so, at vit ikki sleppa at spæla bólt. Vit hava spælt væl higartil í ár. Fremstu menninir duga at bróta úr skipanini og avgera dystirnar. Sigfríður Clementsen hevur lært okkum at standa saman sum ein eind, sigur Johan Ellingsgaard.

## Longu vunnið nógv

Hóast síni bara 37 ár, hevur Sigfríður Clementsen longu vunnið eina rúgvu. Hann tók við fyrstu venjarauppgávuni í 2003, tá hann stóð á odda fyri ÍF, sum flutti upp í bestu deildina.

Í 2005 vann hann føroyameistaraheitið við B36, sum eisini spældi seg víðari í undanumfarinum í UEFA CUP. Í 2006 vann hann steypakappingina við B36, sum hesaferð vann seg víðari í undanumfarinum í Champions League. Í 2008 vann hann føroyameistaraheitið og steypakappingina við EB/Streymi.

Og mánadagin 12. apríl í 2010 er B36, undir leiðslu av Sigfríði Clementsen, oddalið í Vodafonedeildini.

Sigfríður Clementsen leggur dent á úrslitini, og ikki undirhaldið. Tað hevur eydnast væl, um hansara yrkisleið skal mátast í gullheiðursmerkjum.

uni@sosialurin.fo

**ODDAFISKAR**

*Christian R. Mouritsen og hinir í B36 eru framvegis einsamallir á odda eftir trý Vodafone-umfør*

Mynd: Álvur Haraldsen